Fylgiskjal 1

Javntekstur

Galdandi orðingar í Fosturtøkulógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
§ 1. Kvinna, sum býr í Føroyum og er við barn, kann fáa fosturtøku, um inntrivið kann verða gjørt áðrenn endan av 12. viku í viðgongutíðini, og kvinnan hevur fingið í boði ráðgeving sambært § 7 og læknafrøðiliga kunning og vegleiðing um inntrivið sambært § 10.	**1.** Í § 1 verða orðini "í boði" strikað.
§ 2. Hóast freistin sambært § 1 er farin, kann ein kvinna fáa fosturtøku eftir 12. viku í viðgongutíðini uttan loyvi, um lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda, ella um inntrivið er neyðugt fyri at forða fyri, at likamliga og sálarliga heilsan viknar munandi, og vandin fyri hesum er læknaliga grundaður.	**2.** § 2 verður orðað soleiðis: "Hóast freistin sambært § 1 er farin, kann ein kvinna fáa fosturtøku eftir 12. viku í viðgongutíðini uttan loyvi, um lív og heilsa hjá kvinnuni er í vanda, og vandin er læknaliga grundaður."
§ 3. Kvinna, sum býr í Føroyum, kann fáa loyvi til at fáa fosturtøku eftir 12. viku, um: 1) 2) 3) vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga sálarliga ella likamliga sjúku,	**3.** § 3, nr. 3 verður orðað soleiðis: "3) vandi er fyri, at barnið orsakað av ættarbregði, sjúku ella skaða í móðurlívi fær álvarsliga likamliga sjúku,"

§ 7. Kvinnan skal hava í boði óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Ráðgevingin skal m.a. fevna um møguleikarnar fyri stuðli til at fullføra viðgongutíðina og fyri stuðli eftir, at barnið er føtt. *Stk. 2.* Landsstýrisfólkið ásetir nærri reglur um ráðgevingina.	**4.** § 7, stk. 1 verður orðað soleiðis: "Kvinnan skal hava fingið óhefta ráðgeving og stuðulssamrøðu fyri og eftir inntrivið. Ráðgevingin skal m.a. fevna um møguleikarnar fyri stuðli til at fullføra viðgongutíðina, fyri stuðli eftir, at barnið er føtt og at burturættleiða barnið." **5.** Í § 7 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 2.* Í minsta lagi fimm dagar skulu vera ímillum ráðgevingina sbrt. stk. 1 og fosturtøkuna. Í hesum tíðarskeiði skal kvinnan hava í boði at fáa framt eina ultraljóðskanning." Stk. 2 verður eftir hetta stk. 3.
§ 9. Er kvinnan undir 18 ár, og er hon ikki gift, skal tann ella tey, sum hava foreldramyndugleikan, geva samtykki til at søkja um fosturtøku. *Stk. 2.* Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann samráðið loyva, at samtykki sambært stk. 1 ikki skal innheintast. *Stk. 3.* Tá ið umstøðurnar tala fyri tí, kann samráðið geva loyvi til fosturtøku, sjálvt um samtykki sambært stk. 1 verður noktað.	**6.** § 9, stk. 2 og stk. 3 verða orðaði soleiðis: "*Stk. 2.* Tá ið heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann samráðið loyva, at samtykki sambært stk. 1 ikki skal innheintast. *Stk. 3.* Tá ið heilt serligar umstøður tala fyri tí, kann samráðið geva loyvi til fosturtøku, sjálvt um samtykki sambært stk. 1 verður noktað."
§ 10. Læknin, sum fær umsókn um fosturtøku, skal upplýsa kvinnuna um møguleikan fyri ráðgeving og stuðulssamrøðu sambært § 7. *Stk. 2. ...* *Stk. 3. ...*	**7.** § 10, stk. 1 verður orðað soleðis: "Læknin, sum fær umsókn um fosturtøku, skal upplýsa kvinnuna um og vísa henni til ráðgeving og stuðulssamrøðu sambært § 7."

§ 14. ... *Stk. 2.* Í samráðnum eru ein løgfrøðingur, ein sosialráðgevi, ein sálarfrøðingur og tveir læknar. Annar læknin skal vera serlækni í kvinnusjúkum, og hin læknin skal vera serlækni í psykiatri. *Stk. 2.* ... *Stk. 3.* ...	**8.** Í § 14, stk. 2 verður "sálarfrøðingur" strikað og í staðin verður sett: "gudfrøðingur".
Ársfrágreiðing **§ 17.** Samráðið sendir landsstýrisfólkinum ársfrágreiðing um virksemi sítt.	**9.** Yvirskriftin yvir § 17 verður orðað soleiðis: *"Ársfrágreiðing og hagtøl"* **10.** Í § 17 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 2.* Heilsustýrið savnar, viðger og almannakunnger hagtøl um fosturtøkur Landsstýrisfólkið í heilsumálum ásetir nærri reglur um hagtøl og mannagongdir í hesum sambandi."